# Donsku fjølmiðlarnir ikki nøgdir

*Flestu donsku fjølmiðlarnir eru samdir um, at danir vístu ov lítið í dystinunm mikukvøldið. Føroyska liðið fær tó í fleiri miðlum rós fyri teirra leiklut í dystinum*

Jákup Mørk

»Dansk sejr uden dynamik«, »Trænerdebut uden glan« og »Stod der en ný tunnel på højkant«.

Nakrar av yvirskriftunum í donsku bløðunum, eftir dystin millum Føroyar og Danmark Yvirhøvur tykjast tey at vera samd um, at danska spælið væl kundi verið betri, tá teir vitjaðu í Føroyum.

**Ikki nóg beinleiðis**

Tað, sum miðlarnir serliga fýlast á, er, at danir í alt ov stóran mun royndu seg við smáspæli úti á vøllinum, heldur enn at leggja trýst á føroysku verjuna.

Hinvegin eru eisini fleiri rósandi orð til føroyska liðið fyri teirra leiklut. Orð sum »robuste« og »energiske« eru nærum standard orðingar. Eisini omanfyri nevnda yvirskrift um tunnilin, sipar til, at blaðmaðurin hjá Politiken heldur, at føroyingarnar stríddust, so ein skuldi hildið, at ein nýggjur tunnil frá Nyrup stóð upp á spæl.

Serliga eru rósur til Julian Johnsson, sum gav Helveg stórar trupulleikar við djúpu renningum sínum. Annars verður lagt merkis til Toda Jónsson, saman við føroysku verjuni sum heild.

**Minnast brotssparkið**

Ofta eru slíkar frásagnir ikki heilt óheftar, tá tað einamest verður sett fokus á egna liðið. Soleiðis er sjálvsagt eisini í hesum føri, men eitt nú hevur Jyllands Posten lagt til merkis, at føroyingar vórðu snýttir fyri brotsspark.



*Danskir fjølmiðlar tykjast samdir um, at føroyingar áttu størri heiður av dystinum, enn donsku brøðir okkara*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

# Heystar fruktirnar

*Steven Lustü slapp seinastu 10 minuttirnar av dystinum fyri fyrstu ferð at royna seg í landsliðshøpi*

Jákup Mørk

Danskur meistari í vár, og nú eisini á danska A-landsliðnum. Tað er veruliga líkt til, at Herfølge spælarin, Steven Lustü, hevur gjørt vart við seg í fótbóltshøpi.

**Stuttligt**

Sjálvur helt hann tað bara vera stuttligt, at hann soleiðis fær høvi til at heysta fruktirnar av fram úr góða kappingarárinum, har Herfølge endaðu ovast á sigursskamlinum.

Sjálvur varð hann í fjør kosin til ársins leikara í felagnum, og eisini í pørtum av donsku fjølmiðlunum vóru røddir frammi, og vildu hava hann á landsliðið.

Spurdur um hetta hevði ávirkað hann, soleiðis at hann nú hevði bíða eftir at koma á landsliðið, svaraði hann, at tað kanska hevði ávirkað nakað:

- Tá somikið nógv verður skrivað, er tað sjálvsagt at man lurtar eitt sindur eftir tí. Eg hevði tó ikki roknað við, ella bíða eftir, at koma á landsliðið, men hetta er sjálvsagt ein dreymur, sum nú rennur út. At tað so eisini var í dysti móti Jákupi Mikkelsen, ger bara alt enn stuttligari.

Seinastu vikurnar hevur eisini verið skrivað um, at Lustü skuldi verið ávegis til enskan 1. deildarfótbólt, og spurdur um hetta, segði hann, at talan sum so ikki var um nakað ítøkjuligt í løtuni. Hinvegin vónaði hann, at landsliðsúttøkan kanska kundi seta eitt sindur av ferð á í so máta.

At dreymurin er at koma uttanlands at spæla, var hann so ikki í iva um, men hinvegin legði hann dent á, at tað einki gjørdi, um hann framhaldandi fer at spæla við Herfølge:

- Eg trívist sera væl í felagnum, og tað hevur einki við nakra ónøgd at gera, men sjálvandi hevði tað verið stuttligt, um eg hevði fingið møguleikan uttanlands, segði verjuleikarin at enda.



*Elsti debutanturin í danska hópinum var fegin um, at hann nú kundi heysta fruktirnar av góða kappingarárinum hjá Herfølge*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

# Ansað eftir Slovenia

*Slovenia megnaði uttan umstrídda Zahovic at vinna 1-0 móti Kekkia.*

Jákup Mørk

Hóast góða føroyska spælið í dystinum móti dønum, er eingin orsøk at rokna við eini lættari uppgávu, tá Slovenia um tvær vikur kemur á vitjan.

**Vunnu á Kekkia**

Meðan Føroyar á Tórsvølli royndu seg móti dønum spældi Sloveniga á útivølli í Ostrava móti Kekkia, og ikki kann sigast annað enn, at komandi mótstøðulið okkara stóð seg væl.

Tað eydnaðist nevnliga slovenum at vinna dystin vð einum máli móti ongum, og í fótbóltsheiminum verður hetta roknað sum eitt slag av sensatión.

Úrslitið verður ikki minni flott av, at slovenar máttu vera hin umstríddu Zahovic fyri uttan. Sum ikki einaferð er hann komin í andstøðu við venjara sín, og ivasamt er, um hann verður tøkur til dystin móti Føroyum.

Skal metast eftir úrslitunum mikukvøldið, hava føroyingar tó alla orsøk at ansa sær. Zahovic ella ikki!

**Úrslitini í vinadystum hjá hinum landsliðnum í okkara bólki**

**Kekkia - Slovenia**
0-1 (0-0)
0-1: Pavlin 59
16 august. Ostrava

**Russland - Ísrael**
1-0 (0-0)
1-0: Buznikin 82
16 august. Moskva

**Norðurírland - Jugoslavia**
1-2 (1-0)
1-0: Healy 45
1-1: Kezman 63
1-2: Mijatovic 78
16 august. Belfast

**Sveits - Grikkaland**
2-2 (1-2)
1-0: Komisetti 13
1-1: Ouzunidis 20
1-2: Georgatos 23
2-2: Yakin 65
16 august. St Gallen

Luksemburg spældi ikki nakran dyst mikudagin



# Uni vildi hava brotsspark

*Íslendski útisetin var tvær ferðir tætt við at skora mál, og Todi Jónsson var ikki nøgdur við at tapa við tveimum málum móti teimum, sum hann dagliga ferðast ímillum*



*Onkuntíð stóð nógv á framman fyri danska málinum. Her er Todi júst í fer við at lyfta bóltin upp um Schmeichel. Tíverri eydnaðist tað kortini dønum at rudda upp, áðrenn bólturin fór í netið til 1-1*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

Allan Simonsen hevði aftur hesa ferð valt at seta Una Arge við síðuna av Toda Jónsson í álopinum. Kurt Mørkøre loysti Una av, tá átjan minuttir vóru eftir. Sjálvandi var tað torførari hjá Kurt, enn tað var hjá Una, tí føroyingar vóru minni álopskendir síðstu løtuna. Men skulu vit bara meta út frá avrikunum hesa ferð, so sannførdi toppskjúttin í næstbestu deildini í Noregi ikki um, at hann næstu ferð eigur sjálvsagdan rætt at vera millum teir fyrstu ellivu.

Uni Arge hevði tvær tær bestu royndirnar móti danska málinum:

– Eg fari altí9ð at iðra meg um, at fluktarin ikki fór í málið. Eg stóð sjáldsama leysur um brotssparksblettin, bólturin frá Øssuri var góður, eg høgdi til, og eg rakti bóltin væl, men tíverri megnaði Thomas Helveg at benda bóltinum út um stólpan. Eg fylgdi bóltinum, og hann hevði kós beint móti horninum, segði Uni Arge.

Arge maðurin í Akranesi var sera harmur um, at norski dómarin ikki bríkslaði fyri brotssparki:

– Julian Johnsson stútaði bóltin tvørturum til mín. Thomas Helveg vardi fyri við arminum, og eg fati ikki, at dómarin ikki bríkslaði. Eg ivist ikki í, at linjuverjin sá, at tað var brotsspark, men han lætst ikki um vón, segði Uni Arge, sum í dag fer aftur til Íslands. Í vikuskiftinum skal ÍA spæla móti botnliðnum Stjarnuni. Teir í Akranesi hava ikki mist mótið um at vinna meistaraskapin, og teir eru undir øllum umstøðum við í kappingini um pláss í Europa Cup.

**Ov lítið beinleiðis**

Todi Jónsson var ikki nøgdur við at hava tapt 2–0 móti dønum:

– Eg haldi ikki, at teir vóru so nógv betri enn vit, at teir høvdu uppiborið at vinna við tveimum málum. Teir høvdu onkran møguleika, og tað høvdu vit eisini. Munurin var, at teir gjørdeu nyttur burturúr tveimum møguleikum. Tað megnaðu vit ikki.

Tú fekst eina ferð bóltin inn um Peter Schmeichel, men tú náddi ikki at trýsta hann um strikuna. Tú lá flatur í málteiginum. Var talan um brotsspark?

– Nei, tað haldi eg ikki, at tað var. Eg varð ikki feldur.

***Hvussu kundu tit havt fingið eitt betur úrslit?***

– Vit høvdu havt fingið eitt betri úrslit, um vit høvdu megnað at hildið tætt. Men eg haldi eisini, at vit kundu havt verið meiri beinleiðis í framrættaða spælinum. Vit fingu ongantíð orduligt kontraspæl í gongd, tí vit trillaðu ov ofta ov nógv aftarlaga á vøllinum.

JH

# Mugu skora upp á møguleikarnar

*Úrtøkan av møguleikunum eigur at vera betri, heldur Julian Johnsson, sum kanska var tann føroyingurin, sum samanlagt stóð seg best*

Jákup Mørk

Arbeiðsgrevið hjá Føroyum, Julian Johnsson, helt eftir dystin, at sum heild var hann ikki nøgdur um avrikið.

- Vit eru væl við í dystinum so at siga allan fyrra hálvleik og eisini í pørtum av seinna, so í so máta var tað kanska ikki so galið.

Vit vita tó av, at vit fáa ikki meira enn hasar fimm ella seks møguleikarnar ígjøgnum ein dyst, og so mugu vit megna at gera nýtslu av teimum. Tað megnaðu vit ikki í dag, og tí eri eg ikki heilt nøgdur.

**Settu ferðina upp**

Um egna avrikið, sum helst var tað besta føroyska avrikið mikukvøldið, visti Julian ikki rættuliga, hvat hann skuldi halda. Merkisvert var tó, at hann sum so ikki tóktist so ógvuliga móður eftir dystin, hóast hann í kilometrum helst var fremsti føroyingurin í dystinum.

Annars helt hann, eina av orsøkunum til, at danir hóast alt vunnu dystin, vera, at leikferðin fór upp í seinna hálvleiki:

- Teir megnaðu sera væl at fáa nøkur temposkift í spælinum, og í løtum vórðu vit rættuliga koyrdur runt í samanspæli teirra. Hetta viðførdi eisini, at vit í fleiri førum komu í undirtal, tá danir fóru frameftir.

Hóast hetta, so helt hann tó stórsta trupulleikan vera væntandi málini, og helst eru eisini fleiri, sum iðra seg um, at ikki onkur av føroysku royndunum gav úrslit.



*Eisini í hesum føri vinnur Julian bóltin. Sjálvur helt stríðsmaðurin, at vit kunnu vera nøgdir um dystin sum heild, men at tað dróg frá, at ov nógvir møguleikar vórðu misnýttir*
***Mynd: Álvur Haraldsen***